Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hanna Jensen, løgtingskvinna

Svarari: Djóni N. Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Prógvtøkuhættir í eini tíð við vitlíki

Spurningar:

1. Hvørjar eru tær ítøkiligu avbjóðingarnar vegna vitlíki í skúlahøpi sambært landsstýrismanninum og hansara øki?
2. Er arbeiðið at endurskoða prógvtøkuhættir vegna avbjóðingar við vitlíki byrjað?
3. Hvør er tíðarkarmurin fyri broytingum í prógvtøkuhættum í eini møguligari endurskoðan, og í hvønn mun kann arbeiðið verða framt innan verandi játtan til økið?

Viðmerkingar:
Síðani vitlíki gjørdist alment kent og atkomuligt, er tað vorðið flest øllum greitt, at prógvtøkuhættir, sum eru fyriskrivaðir í føroyskum námsætlanum og vegleiðingum kunnu tykjast høpisleysir. Ikki bert tí, at markið fyri, hvussu nógva hjálp ein prógvtakari kann fáa frá umsetingarforritum, leitifunkum eftir talgildum tilfari og tílíkum, er trupult at áseta, men eisini tí, at øll undirvísing gjøgnum skúlaárini er merkt av, hvat skal mátast við skúlaárslok, sambært ásetingum í lógum, kunngerðum og námsætlanum.

Leingi hevur verið tosað um, at námsætlanirnar til føroyska skúlaverkið mugu endurskoðast. Tá hevur verið hugsað um tað samlaða innihaldið av ásetingum um, hvat skal lærast á hvørjum skúlastigi. Nakað er gjørt, men seinastu árini er tað vorðið uppaftur meira átrokandi at fáa gjørt niðurstøður um, hvussu mátast skal, hvat næmingurin sjálvstøðugt dugir og megnar at framleiða til eina prógvtøku. Eisini tí at prógvtøkuhættir ávirka, hvussu undirvíst verður.

Herfyri var eitt álit handað landsstýrismanninum um eftirmeting av miðnámi í Føroyum. Undir kapitlinum *meting av yvirskipaðu avbjóðingunum* stendur undir pkt. 3.3: *Prógvtøkur, prógvtøl, ársmet og nýggja tøknin, serliga vitlíki* m.a. at «... í einum heimi við alsamt framkomnari hjálpitólum og møguleikum fyri at fáa hjálp, verður tað støðugt truplari at tryggja, at næmingarnir sjálvir hava skrivað síni svar. Hetta merkir, at royndir kunnu geva eina órealistiska mynd av førleikunum hjá næminginum og ikki lýsa teirra veruligu førleikar og vitan.» Og eitt av tilmælunum ljóðar so: «Skrivligu royndirnar í verandi líki skulu annaðhvørt takast burtur ella tillagast nýggja tøkniliga veruleikan við verkætlanum og skrivligum royndum uttan hjálpitól.»

Nevnda álit snýr seg um miðnám, men avbjóðingin við vitlíki í mun til skúlaarbeiði og prógvtøkur viðkemur øllum undirvísingarverkinum. Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 23. juni 2025

Hanna Jensen